# KVINNUR VIÐ VÓN

## *Bønaráheitanir fyri september 2023 – Miðasia, Miðeystur, Norðurafrika*

1. Harri, lat teir nýggju *Kvinnur við Vón* partarnar, ið toymi okkara ger á Farsi málinum, bera vónina um Jesus til kvinnur í Iran, og til tey, ið búgva í útlegd í øðrum londum, harímillum Turkalandi. (Sálmur 130:7)
2. Faðir, lat kvinnur í Karakalpakstan* í Usbekistan, ið líða av tunglyndi og ótta orsakað av hjúnaskilnaði, torførum familjuviðurskiftum, arbeiðsloysi, lágum sjálvsvirði ella vantandi útbúgving, finna vón og samleika sín í Tær. (Sálmur 143:7-8) *Karakalpakstan er sjálvstøðug tjóð í Usbekistan við eini vídd á 166.590 km² og fólkatali um 1,818 millión.
3. Gud, lat samkomur og kirkjur í Norðurafrika, ið hava verið tvingaðar at lata aftur seinastu árini, lata upp aftur til tess at geva andaliga føði og kristnan felagsskap. (Matteus 4:4)
4. Skøkjulevnaður í Ísrael, við Tel Aviv sum miðdepli, hevur verið stýrdur av tilflytarum úr fyrrverandi Sovjet. Harri, ger Tú ein útveg fyri hesar kvinnur. (Sálmur 107:28)
5. Vit prísa Tær, Gud, fyri arabisku *Kvinnur við Vón* sendingarnar, og biðja fyri toymunum, ið hjálpa við at vegleiða og geva lurtarunum frálæru. (Rómbrævið 10:14)
6. Gud, við biðja fyri turkiska fólkinum, har prísstøðið síðsta árið er hækkað heili 85%. Fólk eru ikki før fyri at gjalda leigu og kenna seg hjálparleys. (Rómbrævið 15:13)
7. Harri, Gud, vilt Tú hjálpa kvinnunum á Norðurkýpros, ið líða av sálarløstum. Lat tær finna vón og grøðing í Jesusi. (Sálmur 107:13-16)
8. Himmalski Faðir, vit lyfta upp kvinnurnar í Egyptalandi og biðja fyri trygd teirra og um varðveitslu. Verj tær frá skaða og veit teimum frið. (Sálmur 91:11-12)
9. Harri, vit biðja fyri kvinnunum í Yemen og Sudan, har kríggj herjar. Varðveit mammurnar, ið royna at uppihalda børnunum. (Sálmur 46:2)
10. Faðir, varðveit og grøð kvinnur í Usbekistan, ið líða undir harðskapi innanhýsis. Broyt hjørtuni á teimum, ið fremja harðskapin. (Esaias 41:10)
11. Harri, lat giftar menn í Tadsjikistan finna arbeiði í egna landi sínum, so tað ikki gerst neyðugt at fara til Russlands at arbeiða. Fleiri teirra eru fongslaðir, tí teir eru har ólógliga. (Sálmur 90:17)
12. Gud, verj kvinnur, ið eru offur fyri menniskjahandli, og sum enda á spælistøðum og skøkjuhúsum á Norðurkýpros. Hjálp teimum at sleppa burt úr skøkjulevnaði, sum tær eru tvingaðar til. (Sálmur 82:3)
13. Faðir, lat tey, ið vóru úti fyri jarðskjálvtanum í Turkalandi og Sýria, koma at hoyra um Teg. Lat tey koma at kenna Jesus og taka ímóti Honum, og finna vón í Honum. (Esaias 54:10)
14. Harri, vit biðja, at møguleikar hjá kvinnum í Jordan at fáa útbúgving mugu økjast. Hjálp teimum at stremba eftir kunnleika og hegni, ið ger tær førar fyri at geva aftur til samfelagið. (Orðtøkini 1:5)
15. Faðir, varðveit tey í djarva toymi okkara, ið seta lívið í vága til tess at bera evangeliið til fólkið í Norðurafrika, og varðveit eisini tey, ið taka ímóti boðskapinum um vón. (Sálmur 23:4)
16. Gud, opna eygu og hjørtu hjá kvinnum í Ísrael, so tær taka ímóti Jesusi Kristi sum Harra og Frelsara sínum. (Markus 14: 61-62)
17. Harri, gev kvinnum í Miðasia møguleikar at fara undir egið virksemi, ið kann koma teimum og familjum teirra til góða. (Orðtøkini 31:18)
18. Gud, vit biðja um frælsi og verju viðvíkjandi kvinnurættindum í Sýria. Lat sannleika Tín, ið verður borin gjøgnum kristnar miðlar, bera við sær grøðing og endurreising í lívi teirra. (Esaias 61:1)

19. Faðir, gev kvinnum í Irak styrki og dirvi at vinna á trupulleikum; lat tær virka fyri at bera øðrum vón. (Josva 1:9)
20. Tey fátæku í Kirgisistan líða undir fíggjarligum trupulleikum og arbeiðsloysi. Harri, lat stýrið náa út til teirra við mati og heilsutænastu, og á tann hátt hjálpa teimum. (Jákupsbræv 2:15-16)
21. Harri, gev toymum okkara í Norðurafrika vísdóm, og ger tey til reiðar og før fyri at fara undir sendingar, ið kunnu tæna fólki í ymsum lívsumstøðum. (Jákupsbræv 3:17)
22. Faðir, styrk felagsskapin hjá lítla, kurdiska bólkinum, ið fyri stuttum er byrjaður í Miðeystri. Gev bólkaleiðaranum vísdóm og dirvi at samrøða um avbjóðandi evni. (Jákupsbræv 1:5)
23. Gud, vit biðja fyri kvinnunum og familjunum í Norðurafrika, ið stríðast við fíggjarligar og sosialar trupulleikar. Gev teimum vísdóm, hvussu tey skulu liva. (Orðtøkini 21:5)
24. Gud, lat kristnar familjur í Usbekistan opna hjørtu og heim síni fyri børnum, ið eingi foreldur eiga, og fyri børnum, ið koma frá familjum, ið ikki eru førar fyri at taka sær av teimum. (Job 29:12)
25. Faðir, vit biðja fyri heilsu og trivnaði hjá kvinnum í Marokko. Lat tær fáa atgongd til góða heilsurøkt, og gev teimum styrki og lívsmegi. (3. Jóhannesarbræv 1:2)
26. Harri, vit biðja, at tú vilt varðveita ungar kvinnur í samkomunum í Miðeystri, báði andaliga, sálarliga og kropsliga. Lat tær standa fastar í trúnni. (2. Tessalonikubræv 3:3)
27. Kvinnur í Turkmenistan uppliva mong forboð, báði skrivað og óskrivað, ið av órøttum avmarka virksemi teirra. Harri, virka í hjørtunum á leiðarum, so teir virðismeta kvinnur og ynskja at geva teimum meira frælsi. (Lukas 4:18)
28. Gud, moralska skipanin er í afturgongd millum unga fólkið í Norðurafrika, men lat sannleika Tín hjálpa kvinnum at síggja virði í trúføstum, gudrøknum sambondum. (Orðtøkini 3:3)
29. Harri, signa og verj nýggja samskiparan og TWR Kvinnur við Vón toymið á Norðurkýpros, sum tey royna at gera trúartænastu millum ungar, vantrúgvandi kvinnur har. - (Fjórða Mósebók 6:24-26)
30. Faðir, troysta og styrk einligu kvinnurnar í Turkalandi, ið eru heima og taka sær av børnunum og familjunum. (Fimta Mósebók 31:6)

**”Latið okkum tí við dirvi stíga fram fyri hásæti náðinnar,**
**so vit kunnu fáa miskunn og finna náði til hjálp á rættari tíð!”**
**Hebrearabrævið 4:16**

***KVINNUR VIÐ VÓN***

**twrwomenofhope.org**

**Undirvísa, lívga, útgera kvinnur til at læra, biðja, lurta, vaksa og geva**

**”Høvuðsstuðulin undir øllum kristiligum arbeiði er bøn”** **(Eeva Vähäsarja)**

# Kvinnur við Vón

## September 2023 Søga um Vón – *Troyst og Styrki*

Eg ynski at nýta eina løtu at siga tykkum frá mínum djúpa takksemi fyri, hvussu stóra ávirkan trúartænasta tykkara hevur havt á lív mítt. Eg eri ein kvinna úr Libanon og búgvi í einum landi, ið er yvirtikið av vónloysi og við stórum tørvum, men *Kvinnur við Vón*, kristiligu radiosendingar tykkara á arabiskum, hava verið ein kelda til troyst og styrki fyri meg.

Eg fylgi íðin við øllum í sosialum miðlum, og eg lurti regluliga eftir *Kvinnur við Vón* sendingunum. Tá ið eg hevði eina serstakliga torføra tíð í lívi mínum, fekk eg eina djúpa, persónliga uppliving gjøgnum boðskapin. Eg kendi tað sum, at Jesus Kristus talaði persónliga til hjarta mítt, og gjørdist vinur mín og skjól mítt, ið altíð er hjá mær. Nærvera Hansara hevur givið mær eina støðufasta vissu um, at eg altíð kann venda mær til Hansara, og at hann altíð vil vera har fyri meg.

Trúartænasta tykkara hevur havt alstóran týdning á andaligu ferð míni, uttan at tit eru varug við tað. Gjøgnum støðuføstu hjálp tykkara er trúgv mín endurnýggjað og heldur á at vaksa sterkari. Gjøgnum tað, eg sjálv havi upplivað, eri eg sjálv farin at deila upplyftandi boðskap tykkara við aðrar kvinnur, ið treingja til hjálp. Mangar av teimum, ið eg havi havt samband við, lurta nú eftir *Kvinnur við Vón* sendingunum, har tær finna troyst og vón í evangeliska boðskapinum, ið tit senda.

Eg ynski at siga frá djúpa takksemi mínum til hvørja einstaka av tykkum, fyri at vera har fyri meg, fyri at vera ein viti, ið birtir vón, ið lyftir sál okkara til Harran. Trúartænasta tykkara nemur lívið hjá óteljandi kvinnum, og ber ljós inn í myrkastu løtur teirra, og gevur teimum eina glæmu av vón mitt í øllum trupulleikum teirra. Verk tykkara kann ikki metast nóg høgt, sum tað nær út til tørvandi hjørtu og sálir hjá kvinnum í øllum Miðeystri.

Má Harrin signa tykkum ríkliga fyri áhaldandi eldhuga og verk tykkara. Eg biði, at kærleiki Kristusar heldur á at breiða seg gjøgnum arabisku TWR Kvinnur við Vón trúartænastuna og ber umbroyting og vón til teirra, ið hava mest tørv á tí.

Við hjartaligum takksemi og bønum,

Amal
Ein lurtari eftir Kvinnur við Vón á arabiskum.

**Fíggjarstuðul:**
**EvR (Evangeliska Røddin) hevur konto í Betri Banka nr. 9181 000 533 7145**
**til at flyta pening tilskilað til TWR (Trans World Radio). –**
**Allur stuðul, sum kemur inn á hesa konto fer óskerdur til arbeiðið hjá TWR. –**
**TWR PO Box 12, 82002 Bratislava 22 – Slovakia — twre@twr.org**